Fróðskaparsetur Føroya

10. februar 2010

# Fundarfrágreiðing frá fundi í bygnaðarbólkinum 4/2010

Dagur og klokkutíð: Mánadagur 9. februar 2010 kl. 10.00 – 12.00

Fundarstað: Setursskrivstovan

Til staðar: Súsanna Mortensen, Hans Pauli Joensen, Zakaris Svabo Hansen, Rúna Hjelm, Randi Durhuus, Anni Djurhuus og Hanna Horn.

Ikki til staðar: Kári á Rógvi, Birgit Fredriksberg og Jóannes Hansen.

Skrá fyri fundin:

1. Rúna og Randi leggja fram uppskot um skipan av lestrarráðum og akademiskum ráð á Setrinum
2. Zakaris greiðir frá granskingarhjálparunum á Føroyamálsdeilini og Hans Pauli um laborantstarvið á Náttúruvísindadeildini
3. Súsanna greiðir frá arbeiðinum við at gera ein KT-politikk á SRFS
4. Vit leggja eina ætlan fyri víðari arbeiðið í bygnaðarbólkinum. Neyðugt verður helst, at vit hvør sær skriva uppskot til niðurstøður, sum vit taka upp til viðgerðar á fundunum 16.-18. februar

**1.** Rúnaog Randi løgdu fram uppskot um skipan av lestrarráðum á Setrinum. Skipan av lestrarráðum er nevnd í lógini fyri Fróðskaparsetur Føroya. Á fundinum var semja um, at lestrarráðini skulu verða tilmælandi ráð undir dekanunum. Anni vísti á, at ein skipan við lestrarráðum kundi vera ein tryggleiki hjá lesandi fyri, at undirvísingarviðurskifti verða tikin upp so hvørt. Hon helt eisini, at lestrarráðini kunnu vera ein umráðandi partur í menningini av útbúgvingunum, og at menning av eftirmetingarskipanum avgjørt eigur at vera ein partur av uppgávunum hjá lestrarráðnum. Eftirmetingin eigur at vera elektronisk. Tikið varð undir við uppskotinum um skipan av lestrarráðum við nøkrum minni broytingum, millum annað varð mett, at góðskriving av skeiðum og upptøka av nýggjum studentum heldur eigur at vera partur av uppgávunum hjá undirvísingarleiðarunum. Ein starvsskipan fyri lestrarráðið varð eisini viðgjørd á fundinum. Spurningurin um, hvat vit gera fyri at fáa lesandi við í lestrarráð, varð eisini umrøddur. Er tað nokk fyri tey at fáa hesa uppgávu við á sítt CV, ella skulu tey møguliga fáa ECTS fyri tað? Stýrið ásetir í starvsskipan eftir tilmæli frá rektara neyvari reglur fyri skipan, uppgávur og virksemi hjá lestrarráði, m.a. hvussu leingi limirnir skulu sita í ráðnum.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

Eisini varð eitt uppskot um skipan av akademiskum ráð lagt fram. Akademiskt ráð er eisini nevnt í lógini fyri Fróðskaparsetur Føroya. Semja var um, at meðan lestrarráð hoyra heima á deildunum, hoyrir akademiskt ráð heima undir rektaranum. Tað skal sostatt bert vera eitt akademiskt ráð á Setrinum, sum skal vera eitt tilmælandi ráð undir rektaranum. Av tí at tað stendur so lítið í lógini um, hvørjar uppgávur akademiska ráðið skal hava, var tað ein ávís óvissa á fundinum um hetta. Avtalað varð tí, at Randi og Rúna skulu kanna nærri, hvørja funksjón tílík ráð hava við onnur universitet í Norðurlondum, og at endaliga viðgerðin av hesum málinum verður millum funda.

**2.** Zakaris legði fram eina frágreiðing um uppgávurnar hjá granskingarhjálparunum á Føroyamálsdeildini, og Hans Pauli legði fram starvslýsingina hjá laborantinum á Náttúruvísindadeildini. Hans Pauli kunnaði eisini um, at hann hevur sett ein av lektarunum sum leiðara fyri laboratoriinum, og at partur av uppgávunum hjá honum er fíggjarligi raksturin á laboratoriinum. Í sambandi við hetta varð tosa um tørvin á at fáa studentastørv á Setrinum. Hans Pauli helt, at størsta forðingin fyri at fáa studentar til at taka sær av undirvísing, t.d. í samband við vegleiðing av uppgávum o.ø., er, at fleiri av deildunum ikki taka lesandi inn á hvørjum ári.

**3.** Súsanna greiddi frá, at Sjúkrarøktarfrøðiskúlin hevur ein KT-politikk, sum er góðkendur av Dátueftirlitinum. KT-politikkurin er bygdur á ein leist, sum Innlendismálaráðið hevur gjørt. Hon meinti, at hesin leisturin kundi brúkast á øllum megindeildunum á Setrinum. Tað er tó neyðugt, at hvør deild sær fyllir út skjalið, soleiðis at lokalu viðurskiftini verða lýst. Semja var um, at KT-tænastan kundi samskipa arbeiðið at gera ein KT-politikk fyri alt Setrið, og at miðað eigur at vera ímóti, at hesin verður sendur Dátueftirlitinum til góðkenningar í seinasta lagi 1. januar 2011.

**4.** Síðsta mál á skránni var at leggja eina ætlan fyri víðari arbeiðnum í bygnaðarbólkinum. Av tí at tíðin er við at renna undan, vóru vit samd um, at vit skulu býta uppgávurnar, sum enn eru eftir, millum okkum til endaligu fundirnar, sum verða í komandi viku.

**Arbeiðssetningur – grein fyri grein:**

1. Definera og skipa megindeildirnar á setrinum, millum annað kanna møguleikan fyri, at deildirnar kunnu vera færri í tali enn nú (smb. § 16).
   ***Hans Pauli*** *tekur sær av at gera ein samandrátt av funksjónunum, sum vit hava á Setrinum í dag, og eitt upplegg til framtíðar bygnað.*

2. Definera arbeiðsuppgávurnar og heimildirnar hjá dekanunum (smb. § 15).
   *Hetta er gjørt.*

3. Definera akademisk, fyrisitingarlig og tøknilig størv, so starvsinnihaldið verður greitt og dynamiskt.
   ***Zakaris*** *átekur sær at gjøgnumganga uppskot frá Jóan Paula um framtíðar akademisk størv á Setrinum.*

4. Økja um møguleikar fyri tvørgangandi gransking í samstarvi við aðrar føroyskar stovnar.
   ***Jóannes*** *nærlesur strategiskjølini frá deildunum og ger eina niðurstøðu um, hvat Setrið kann gera á hesum økinum.*

5. Seta karmar fyri skipan av lestrarráð og uppgávum tess (smb. § 17).
   *Hetta er gjørt.*

6. Seta karmar fyri skipan av akademiskum ráð og uppgávum tess (smb. § 18).

***Rúna og Randi*** *skulu kanna nærri, hvørja funksjón tílík ráð hava við onnur universitet í Norðurlondum.*

7. Starvsfólkapolitikkur/Samstarvsráð.
   ***Súsanna og Rúna*** *gera eitt uppskot til starvsfólkapolitikk.*

8. Seta upp karmar fyri samskifti innanhýsis og uttanhýsis.
   ***Randi*** *ger eitt uppskot til framtíðar samskitfti á Setrinum.*

9. Seta karmar fyri umsiting av fíggjarviðurskiftum, harundir menning av undirstøðikervinum og inntøkukeldum afturat almennu fíggingini.
   ***Hugin og Rúna*** *gera eitt uppskot til skipan av fíggjarøkinum á Setrinum.*

***Kári á Rógvi*** *lýsir bygnaðin á Akureyri Universiteti skrivliga, sum síðani verður settur í fundarfrágreiðing 1/2010.*

*Avtalaðu, at øll lesa allar strategi´irnar ígjøgnum, tí at vit á tí eina fundinum í komandi viku skulu viðgera strategiarbeiðið á deildunum/skúlunum og gera eina niðurstøðu.*

Fundirnir í komandi viku verða í Ovastovu, 16.,17. og 18. februar, kl. 8.30-12.00, har seinasta hond verður løgd á tilmælið til stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya.